# Tíggju hava tryggjað sær atgongumerkini

**Harafturat styrktu stórar europeiskar fótbóltstjóðir sum eitt nú Holland, Frakland, Portugal og Italia sær mikukvøldið um møguleikan at vera uppi í, tá ið tað næsta summar fer at verða telvað um HM í Týsklandi**

HM UNDANKAPPINGIN
*Jóannes Hansen*

Nú hava flestu fótbóltstjóðirnar bara tveir dystr eftir í hesi HM undankappingini. Og nú gerst tað alt meiri greitt, hvørjir luttakararnir fara at vera, tá ið endaspælið í Týsklandi verður í juni næsta summar.

Higartil er tað greitt, hvørjir tíggju av teimum 32 luttakarunum fara at vera. Týskland er sjálvskrivaður luttakari, tí teir fara at hýsa leikunum. Úr Europa hevði Ukreina longu leygardagin tryggjað sær fyrsta atgongumerkið nakrantíð til luttøku í endaspæli. Í Suðuramerika, har øll londini spæla á heimavølli og útivølli móti hvørjum øðrum, hava Argentina og Brasilia tryggjað sær pláss í endaspælinum. Ecuador og Paraguay eru eisini væl fyri, meðan fyrrverandi heimsmeistararnir Uruguay eru í tættari kapping við Kolombia og Kili um fimta plássið, sum ber kvalifikatiónsdystir móti Australia við sær.

Hósnáttina tryggjaði Meksiko sær við 5-0 sigri á Panama sær pláss í endaspælinum sum umboð úr bólkinum, sum fevnir um Norðuramerika, Miðamerika og Karibia. USA hevur frammanundan tryggjað sær rætt til luttøku úr sama undankappingarbólkinum, og Costa Rica liggur væl fyri í kappingini um triðja plássið úr hesum partinum av heiminum.

Iran hevur tryggjað sær luttøku í HM endaspælinum úr asiatiska bólkinum, og tað hava Suðurkorea og Japan, sum hýstu endaspælinum í 2002, eisini gjørt.

Í teimum átta europeisku undankappingar bólkunum vóru nógvir dystir mikukvøldið. Úrslitini hjá Hollandi, Fraklandi, Portugal og Italia og úrslitini hjá næstu kappingarneytunum hjá hesum fýra stóru europeisku fótbóltstjóðunum vóru soleiðis, at tað nú skal laga seg meiri enn illa, um hesar tjóðirnar ikki fara at teljast millum tær 32 í Týsklandi næsta summar.

**Bólkur 1**
Holland gjørdi sítt, tá ið teir vunnu 4-0 á heimavølli móti Andorra. Kekkia gjørdi eisini sítt, tá ið teir vunnu 4-1 á heimavølli móti Armenia, sum er aftast í bólkinum.

Holland er fýra stig undan Kekkia. Tað ber við sær, at Holland fer at vinna bólkin, um teir í síðsta umfarinum megna at fáa fult á heimavølli móti Makedonia, sum Finnland mikukvøldið vann 5-1 á heimavølli móti. Um Holland vinnur heimadystin móti Makedonia, so er ikki neyðugt hjá teimum at fáa nakra úrtøku, tá ið teir 8. oktober skulu spæla í Kekkia.

Kekkia hevur so mikið nógv stig á næstfremsta plássinum, at tað er góður møguleiki fyri, at teir fara at tryggja sær beinleiðis luttøku, tí teir verða besti tveyarin. Umframt á heimavølli móti Hollandi skal Kekkia spæla í Finnlandi.

**Bólkur 2**
Danir liva framvegis í vónini um, at tað skal eydnast at vera við, tá ið tað næsta summar fer at ganga fyri seg sunnanfyri markið. Men vegurin gjørdist mikudagin uppaftur knortlutari. Danski venjarin, Morten Olsen, hevði undan mikudegnum róð fram undir, at Ukreina, sum longu leygardagin tryggjaði sær pláss í endaspælinum, ikki fór at taka uppgávuna á heimavølli móti Turkalandi í nóg stórum álvara. Ukreina hevði ikki tapt í tíggju teimum fyrstu dystunum, men móti Turkalandi taptu teir 1-0!

Harvið verður tað Turkaland, sum fer at vinna næstfremsta plássið og harvið rættin til kvalifikatiónsdystir, um teir á útivølli ikki missa stig móti Albania.

Grikkaland og Danmark gjørdu mikudagin sítt fyri framvegis at hava møguleika at taka plássið frá Turkalandi. Griksku europameistararnir vóru kroystir í Kasakstan, sum framvegis einki stig hevur fingið. Heimaliðið var á odda 1-0, inntil tað bara restaði eitt lítið korter. So javnaði Grikkaland, og í yvirtíðini skoraðu teir sigursmálið.

Í Danmark iðra teir seg um, at teir fyrr í kappingini bara megnaðu 2-2 á útivølli móti Georgia. Mikukvøldið vann Danmark í Parkini 6-1 á Georgia, sum í 20. minutti misti ein mann. Danir spældu mótstøðuliðið av vøllinum, og málini vóru hvørt betri enn annað. Søren Larsen var á vøllinum í ein hálvan tíma. Hann skoraði tvær ferðir við høvdinum, og nú hevur hann í fimm dystum, sum hann bara hevur spælt brotpartar av, skorað seks mál. Tað er neyðugt at leita aftur til navnframa Ole Madsen fyri at finna makan til avrik.

**Bólkur 3**
Portugal megnaði málleysan javnleik í Moskva móti harðastu kappingarneytunum til fremsta plássið. Harvið er støðan tann, at Portugal skal vinna trý stig tilsaman í heimadystinum móti Liktinstein 8. oktober og í útidystinum móti Letlandi 12. oktober.

Liktinstein hevur í hesi kappingini staðið seg betri, enn teir nakrantíð hava gjørt áður. Teir vunnu mikukvøldið 3-0 á heimavølli móti Luksemborg, sum hevur staðið seg uppaftur verri enn Føroyar, men eingin roknar við, at Liktinstein verður ført fyri at spenna bein fyri Portugal.

Slovakia kappast við Russland um næstfremsta plássið. Fyri Russland var málleysi javnleikurin móti Portugal eitt slag av uppreisn. Tá ið liðini síðst hittust í undankapping, vann Portugal 7-1! Slovakia spældi 1-1 í Letlandi, og í síðsta umfarinum 12. oktober, tá ið Slovakia fer at fáa vitjan av Russlandi fer at verða gjørt av, hvat av hesum báðum londunum skal luttaka í kvalifikatiónsumfarinum.

**Bólkur 4**
Heldur ikki á heimavølli móti Ísrael eydnaðist tað Føroyum at fáa stig. Harvið er tað greitt, at einki heimastig varð vunnið í hesi undankappingini. Ísrael hevur møguleika fyri at tryggja sær enn eitt kvalifikatiónsumfar (undan EM taptu teir stórt móti Danmark í kvalifikatiónsumfari). Treytin hjá teimum er, at teir 8. oktober vinna móti Føroyum, og so skulu fleiri onnur roknistykki ganga upp.

Thierry Henry hevur ikki so nógv verið at sæð til, tá ið Jón Rói Jacobsen og Óli Johannesen hava verið mótstøðumenninir. Mikukvøldið vísti franski Arsenal spælarin, at tað framvegis eru mál í honum. Frakland vann fyri fyrstu ferð í meiri enn eina hálva øld í Dublin. Teir vunnu 1-0, og Henry skoraði einsamalla málið.

Fransmenn hava sagt, at nú eru allir dystirnir hjá teimum at rokna sum finalur. Nú eru teir saman við Sveis, sum vann 3-1 á Kypros, á odda í bólkinum, og 8. oktober hittast grannarnir í avgerandi uppgerðini, sum verður í Sveis. Fýra dagar seinni skal Frakland spæla á heimavølli móti Kypros, meðan Sveis skal til Írlands. Írland er framvegis við í kappingini. Treytin hjá teimum er, at teir skulu vinna á Kypros 8. oktober og á heimavølli móti Sveis 12. oktober. So fer tað kanka at bera til.

Ísraelski venjarin var mikukvøldið ógvuliga áhugaður í at frætta, hvussu tað gekk á Kypros, har støðan leingi var 1-1.

**Bólkur 5**
Italia syrgdi við 4-1 sigri í Hvítarusslandi fyri, at teir so at siga hava tryggjað sær pláss í endaspælinum. Teir eru undan tveimum teimum síðstu umførunum fimm stig frammanfyri Slovenia, sum við 2-1 sigri í Moldova legði seg upp á síðuna av Noregi í kappingini um næstfremsta plássið.

Fyri Noreg var tað ógvuliga stórt vónbrot, at teir á heimavølli taptu 2-1 móti Skotlandi, sum nú hevur teoretiskan møguleika at koma afturíaftur, men sum í veruleikanum bara hevur æruna at spæla fyri.

Italia kann endaliga tryggjað sær bólkasigurin, tá ið teir 8. oktober fara at taka ímóti Slovenia. Sama dag skal Noreg spæla á heimavølli móti Moldova, og 12. oktober sær skráin soleiðis út: Italia-Moldova, Hvítarussland-Noreg og Slovenia-Skotland.

**Bólkur 6**
Sessurin undir svenska Sven-Göran Ericsson gjørdist mikukvøldið uppaftur heitari. Ongland tapti fyri fyrstu ferð síðani 1927 á útivølli móti Norðurírlandi. Tjóðirnar hava dystast 98 ferðir, og hetta var sjeynda ferðin, at Norðurírland vann. Hetta var fyrsta undankappingartapið hjá Onglandi, síðani svenskarin í 2001 fekk ábyrgdina av liðnum. Nú verður hann í eingilsku pressuni ákærdur fyri at hava gjørt skilaleysar útskiftingar. Tað er fyrst og fremst svenska venjaranum og ikki eingilsku spælarunum, at tað er galið við - heldur eingilska pressan!

Pólland vann 1-0 á heimavølli móti Wales. Harvið eru teir fimm stig frammanfyri Ongland, sum tó hevur spælt ein dyst færri. Eysturríki megnaði bara 0-0 í Aserbadjan. Harvið tryggjaði Ongland sær í minsta lagið næstfremsta plássið. Um teir skulu vinna bólkin, so skulu teir vinna heimadystirnar móti Eysturríki og Póllandi ávikavíst 8. og 12. oktober.

Pólland hevur fleiri ferðir áður spælt Onglandi puss í undankappingum, og tað kann meiri enn so vera, at pólverjar enn eina ferð fara at taka bólkasigurin frá Onglandi. Svenski venjarin harmast um tapið í Belfast, men hann ætlar sær ikki úr heita sessinum, og hann sigur seg vera sinnaðan saman við spælarunum at gera alt, sum skal til, fyri at vinna rættin at luttaka í Týsklandi næsta summar.

Tá ið HM endaspælið í 1974 var í Vesturtýsklandi, taldist Ongland ikki millum teir sekstan luttakararnar. Pólland hevði tikið møguleikan frá teimum!

**Bólkur 7**
Real Madrid og Barcelona teljast millum stinnastu feløgini í Europa. Í landsliðshøpi hevur tað ongantíð gingið framúr hjá ikki so lítið sund-

*Framhald á síðu 22*


**Hi-Fi**

**Stórt úrvæl av hátalarum og forsterkarum**

**LG LH-T250 surroundanlegg**



1.498,-

Sera kompakt surroundanlegg við DVD og útvarpi. Umframt DVD spælir hann eisini DivX og Xvid filmar. Hevur eina total effekt uppá 440W

**Viewpia 32" LCD sjónvarp**



9.998,-

Snøggur LCD skermur frá Viewpia ið nýtur eitt LG/Philips panel ið gevur sera góða myndagóðsku. Eisini er tað klárt til HDTV við eini upploysn uppá 1366 x 768, og hevur eisini ein kontrast uppá 1200:1

**Panasonic bilstereo CQ-C1301**




1.398,-

Stílfult bilstereo frá Panasonic, ið spælir mp3 og WMA fløgur. Eisini hevur tað RDS.

Á HJALLA · 188 HOYVÍK
TEL 315415 · FAX 319001
damor